# TWR -KVINNUR VIÐ VÓN

## *Bønaráheitanir fyri august 2023*

## *Við serligum atliti at Eystur og Suður Afrika*

1. Tú ert Faðir teirra faðirleysu, Harri. Lat stjórnina í Burundi taka sær av og fáa til vega heim fyri gøtubørn, ið eru svong, heimleys og bidda um hjálp. (Sálmur 82:3)
2. Faðir, gev teimum trúgvandi í Etiopia styrki og skynsemi at forða fyri, at politiskar hugsanir úr ættarbólkum koma inn í samkomuna. Hetta ávirkar sosialu samveruna, og kann bróta niður trúnna hjá samkomulimunum. (Kolossebrævið 2:8)
3. Harri, ger ein útveg fyri tey í Kenja, ið royna at fáa peningaligan stuðul at fara undir at framleiða og senda *Kvinnur við Vón* útvarpssendingar, ið kunnu hoyrast í økjum rundan um Nairobi. (Sálmur 34:11- ensk 34:10)
4. Gud, vit biðja, at kvinnur í Malavi kunnu fáa betri atgongd til undirvísing og møguleikar, so tær kunnu mennast í hegni og kunnleika, og sostatt betra um livikorini. (Orðtøkini 1:7)
5. Faðir, skap í leiðarum okkara í Suðurafrika hjørtu, ið flóta yvir av samhuga og góðsku at náa menniskju, ið ikki kenna Teg, sum teir tæna Tær í sannleika. (Sálmur 107:1)
6. Gud, vit biðja fyri muslimska fólkinum á Sansibar, ið taka ímóti Jesusi gjøgnum *Kvinnur við Vón* útvarpssendingar. Styrk tey, so tey standa føst í trúnni á Teg. (Matteus 5:11)
7. Harri, vilt tú binda vónloysisandan, ið fær so nógv ung at gera sjálvmorð í Simbabvi. Reis upp ráðgevarar, ið kunnu leiðbeina tey. (1. Jóhannesarbræv 4:4)
8. Faðir, vilt Tú útvega arbeiði og tað neyðturviliga til fátækar kvinnur og menn í Burundi, ið einki eiga til at lívbjarga sær. (Sálmur 34:7 – ensk 34:6)
9. Alveitandi Gud, vilt tú kalla trúgvandi, ið kunnu tæna líðandi kvinnum í etiopiskum fongslum, og hjálpa teimum við tí, tær hava tørv á. (Hebrearabrævið 13:1-3)
10. Harri, gev einligum kvinnum í Kenja vísdóm og styrki, so tær finna javnvág í millum barnaaling, húsligt arbeiði og arbeiði úti. (Sálmur 28:7)
11. Miskunsami Gud, grøð offrini, ið upplivdu melduródnina Freddy á Malavi, har flestu familjur og heil samfeløg hava mist onkran kæran og haraftrat ognir. (Jóhannes 14:27)
12. Harri, lat kvinnur í Eastern Cape í Suðurafrika fáa praktiskt og andaligt innlit, sum tær lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum á Xhosa málinum. (Filippibrævið 1:9-10)
13. Gud, vilt Tú steðga mentanarligu siðunum í Tansania, ið eru skaðiligir fyri kvinnur, m.a. kropslig revsing, umskering av gentum og barnagiftarmál. (Efesusbrævið 5:25)
14. Himmalski Faðir, vit biðja Teg um at signa tjóðina í Simbabvi, so hon aftur gerst kornløðan í Afrika. (Nahum 2:3)
15. Harri, vit biðja, at Tú vilt frelsa húsbóndar í Burundi. Ósemja um trúarspurningar millum vantrúgvandi menn og trúgvandi konur ger, at stríð er í parlagnum. (Ápostlasøgan 16:30-33)

16. Prísa Gudi, nú TWR Kvinnur við Vón trúartænastan samstarvar við aðrar vælgerandi felagsskapir at hjálpa fólkinum í Nekemte í Etiopia, ið eru flutt úr heimum sínum av krígsávum, við at geva teimum føði og klæði. (Sálmur 41:2 - ensk 41:1)
17. Faðir, veit kvinnum og gentum í Kenja tryggleika, ið eru úti fyri konufólkakúgan og harðskapi, og at verða kynsliga misbrúktar av familjulimum. Broyt hjørtuni á teimum, ið gera seg inn á hesar kvinnur. ( 2.Tessalonikubræv 3:3)
18. Lat kvinnurnar í Malavi fáa atgongd til tilfar, ið kann hjálpa teimum at vaksa í trúnni, og har tær kunnu finna troyst og styrki í Gudi.( Esaias 41:10)
19. Faðir, lat tey, ið líða í Suðurafrika, kenna miskunn og góðsku Tína. Gev teimum dirvi og vón at hyggja upp um umstøðurnar og standa stinn í at tæna Tær. (Sálmur 31: 20 - ensk 31:19)
20. Harri, ger at hjún í Tansania elska hvørt annað og liva heilagt lív, vegleidd av Anda Tínum. Grøð harðskapin, vánaliga samskiftið og onnur viðurskifti í hesum hjúnaløgum, sum ger, at talið á hjúnaskilnaðum økist. (1. Pætursbræv 4:8)
21. Gud, vit biðja teg um at útvega ungum gentum í Simbabvi arbeiðsførleikar, so at tær kunnu sleppa undan at søkja til skøkjulevnað. (1. Tessalonikubræv 4:3)
22. Harri, verj kvinnurnar í Burundi, ið hava rætt til at arva ognir. Gev teimum trygd fyri, at menn, ið hava ættarbond til tær, ikki taka ognirnar frá teimum. (Orðtøkini 31:9)
23. Faðir, takk fyri TWR Kvinnur við Vón trúartænastuna í Etiopia. Gev hesum toymi styrki, náði og vísdóm. (Orðtøkini 2:6)
24. Vit leita til Tín, Harri, um at varðveita kvinnur og gentur í Malavi frá harðskapi og mismuni. (Esaias 1:17)
25. Rannsaka og reinsa okkum, á Gud. Lat hugsanir, orð og gerðir okkara líka Tær. Umskapa okkum við endurnýggjan sinnis okkara. (Rómbrævið 12:2)
26. Faðir, vit biðja fyri trongstøddum kvinnum í Tansania. Lat tær fáa neyðuga hegni, so tær kunnu finna arbeði og kunnu forsyrgja familjum sínum. (5. Mósebók 15:11)
27. Gud, vit biðja um frið í heimum í Simbabvi, og steðga harðligum atburði, ið hevur neiliga ávirkan á børnini. (Esaias 60:18)
28. Vit prísa Tær, Harri, at nú friður valdar í Etiopia, hava nógvir næmingar heilt frá barnagarði og upp til miðnámsskúla, upplivað eitt umhvørvi, ið stuðlar uppundir at tey sleppa at læra. (Prædikarin 7:12)
29. Faðir, gev leiðarunum í Malavi vísdóm, dirvi og styrki, so teir kunnu stýra tjóðini væl. (Josva 1:9)
30. Gud, Faðir, gev kvinnunum í Suðurafrika, ið eru arbeiðsleysar, skapandi møguleikar at fáa eina inntøku, ið kann nøkta tørv teirra (2. Korintbræv 9:8)
31. Harri, vit biðja Teg um at nøkta tørvin hjá lærarum í Simbabvi, og endurkveikja áhuga teirra til at geva frálæru og hjálpa næmingunum at fáa prógv. (Sálmur 32:8)

**”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn”** (Eeva Vähäsarja)

# Verið villig at verða umskapt

## *“At Umfevna Vón”*

eftir Susie Peg, altjóða leiðara av TWR Kvinnur við Vón.

Í eini samrøðu, eg nýliga hevði við ein vin um broyting, segði hann: “Eingin kann av sonnum siga, at teimum dámar broyting. Tað er ein tilgongd, ið er pínufull og kennist ótrygg. Fólk kunnu gleðast um úrslitið, men broyting er ikki altíð nakað at gleða seg til!”

Samstundis sum eg eri samd í, at tilgongdin kann verða ógvuliga óhugalig, tori eg at siga, at mær líkar broytingar. Hvussu við tykkum? Hvat dámar tykkum hetta evnið? Kanska halda tit sum eg og siga, at í veruleikanum eru tit glað fyri eina broyting, ella siga tit sum vinur mín, at tykkum ikki dámar at fara ígjøgnum eina broyting.. Ella siga tit kanska, at tað veldst um, hvør broytingin er.

Satt at siga slepst ikki undan onkrum broytingum. Hvønn dag broytist heimsmyndin, tøknin hevur framgongd, nýggjar framleiddar vørur koma á marknaðin, og nakrar av teimum, okkum dámdi **so** væl, fáast ikki longur! Okkara egna likam broytist hvønn dag. Tað er ein natúrlig tilgongd, ið er uttan fyri okkara ávirkan, og enntá vilja okkara.

Hóast so nógvar broytingar henda í heiminum uttan okkara “loyvi”, fara aðrar grundleggjandi broytingar einans at fara fram, um vit eru við í tilgongdini. At endurnýggja sinni okkara – og sum úrslit av tí at umskapa atburð okkara – krevur, at vit hugbinda vilja okkara. Uttan hendan viljan, halda vit fram í sama hugsanarhátti, ið leiðir okkum til somu kenslur, somu gerðir og somu reaktiónir. Eru vit ærlig, so fáa enntá fólk, ið dámar broytingar, somu avbjóðingar til tíðir: Vit eru ikki altíð “villig” at fara ígjøgnum slíkar tvørleikar, ið ein slík broytingartilgongd ber í sær.

Eg kann ikki lata vera við at hugsa um Na´aman. Vit kunnu lesa um søgu hansara í 5. Kapittuli í *Seinnu Kongabók*. Kapittulin byrjar við at lýsa hann sum “herhøvdinga áramkongs, hevði *nógv at siga hjá harra sínum,og var nógv virdur,* tí við honum hevði Harrin givið áramearum sigur, hann var *veldigur kappi...*” Greitt var, at hann var høgur í mæti!

Tó, sum vit lesa víðari, síggja vit, at hann upplivdi eina broyting í lívinum, ið hann ikki var harri yvir: “Hann var veldigur kappi, men spitalskur.” Vit vita øll, at sjúkur ikki einans ávirka likam okkara, men ávirka eisini kenslur okkara. Vanliga krevur tað tillaging í lívshátti og ætlanum okkara. Í hesum føri hjá Na’amani hevði sjúkan eisini ávirkan á tign hansara.

Tá ið arbeiðisgentan hjá konu hansara, ein smágenta, ið var tikin til fanga úr Ísraelslandi, hoyrdi tíðindini, segði hon matmóðir síni, at Na´aman skuldi fara til Elisa, ið var profetur Harrans. Hon var vís í, at hetta var leiðin til grøðing. Við vælsignilsi frá konginum fór Na´aman avstað at hitta kongin í Ísrael, men tað vísti seg, at hann kundi ikki hjálpa. Men so skjótt sum Elisa hoyrdi um Na´aman, segði hann: “Lat hann koma til mín! So skal hann sanna, at profetur er í Ísrael.” Har var vón!

Tá ið Na´aman at enda kom til húsið hjá Elisa, hitti hann ikki Elisa, men tænara hansara, ið gav honum hesi boð: “Far og baða tær í Jordan sjey ferðir! So verður likam títt frískt aftur, og tú verður reinur.” Na´aman trúði ikki sínum egnu oyrum, og ilt kom í hann! Heilt til hesa løtu hevði hann gjørt sær stóran ómak at leita eftir hjálp. Hann hevði viljan til hesa broytingartilgongd. Men hesi boð kendust sum ein háðan móti honum! At baða sær í áunum í Ísrael ljóðaði ikki væl í hansara oyrum. So hann gjørdi av at rýma avstað aftur.

Tænarar Na´amans royndu at yvitala hann og søgdu: “Faðir, hevði profeturin álagt tær okkurt, sum var nógv fyri, hevði tú tá ikki gjørt tað, so hví ikki gera eftir boðunum frá Elisa?” Na´aman hugsaði um hetta og broytti hugsan sína og vildi fylgja boðunum frá profetinum. Tá ið hann hevði baðað sær sjey ferðir í ánni Jordan, var Na´aman fullkomiliga grøddur!

Broytingartilgongdin hjá Na´amani líkist nógv okkara. Hann ynskti veruliga eina broyting. Men tá ið hann sá, at broytingartilgongdin var heilt øðrvísi enn tann, sum hann hevði hugsað sær, og nógv meir eyðmýkjandi, var hann við eitt ikki villigur. Tíbetur eggjaðu tænarar hansara honum ikki at gevast, tí tilgongdin fór umsíðir at eydnast. Og tað var tað vert! Broyting hansara gjørdist størri enn einans likamlig grøðing! Tá ið Na´aman sá, at hann var grøddur, segði hann: *"Nú veit eg, at eingin Gud er á allari jørðini uttan í Ísrael!"*

Bøn mín er, at vit verða lívgað av hesi søgu, so at vit verða villig til óhugaligar broytingartilgongdir í lívi okkara. Eru vit villig fara vit eisini at uppliva kraft Guds og dýrdargera navn Hansara.

**"Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar,**

**so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!"**

**Hebrearabrævið 4:16**

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

## Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva

**Fíggjarstuðul:**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**